# Nú verður G! Mini

Seinastu fyrieikingarnar verða nú gjørdar til nýggja festivalin, G! mini. Hesin festivalur er øðrvísi enn gamli G! festivalurin á tann hátt, at hesuferð verða tað mest føroyskir bólkar, og spæla hesir ókeypis í ár. Í ár verða tað bert tveir pallar, sum flest øll kenna aftur frá gamla G! festivalinum, nevniliga Spæliplássið og Grundin. Og tað eru hesir báðir tónleikapallar, ið verða karmur um nýggja og endurfødda festivalin. Og sum tað sæst á hesum myndu, verða seinastu fyrireikingarnar, so sum ljós og ljóðviðurskiftið, fingin í rættlag í dag.

Í ár verður tað Hvonn, ið kemur at standa fyri matinum, og harumframt hava fyrireikarnir fingið fatur á nýggjari ljóðútgerð. Talan verður sostatt um góðan kvalitet fram um kvantitet.

G! mini byrjar í dag, og heldur fram til sunnumorgunin klokkan fýra.

rn.










*Seinastu fyrireikingarnar verða nú gjørdar til G! mini.*

*Myndir: MOMO*

